tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 13/2017 |
| Fundardagur | 11. december 2017 kl. 17:00-18:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Anita Vibergsdóttir, Kristina Roest, Alvi Mortensen, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen, Anfinn Hammerfoss Leo og Pauli Einarson

Skrivari: Henrik Weihe Joensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Góðkenning av treytum fyri innkallan av tiltakslimi | 2 |
| 2 | Samanbering av skattatølum í november og restina av árinum | 2 |
| 3 | Eykajáttan hjá Tvøroyrar kommunu fyri 2017 | 3 |
| 4 | Velja umboð av Tvøroyri í Eldraráðið fyri Suðuroynna | 4 |
| 5 | Broyting av byggisamtyktini á Tvøroyri - partur av matr. nr. 376, matr. nr. 374 og litra "F" verður broytt til øki F "almenn frítíðarøki" | 5 |
| 6 | Støðutakan til møguligar samsýningar til starvsnæmingar | 6 |
| 7 | Dagføring av reglugerð fyri brúk av bátaplássum | 7 |
| 8 | Uppskot til leigusáttmála í sambandi við høli til motorlæru í Tvøroyrar skúla | 8 |




11. december 2017

Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 13/2017 |
|---|---|
| Fundardagur | 11. december 2017 kl. 17:00-18:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**81.00.00-A00-7-17**

## 1. Góðkenning av treytum fyri innkallan av tiltakslimi

### Málsfrágreiðing

Býráðið skal sambært § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini taka støðu til um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi fyri Kristin Michelsen, sum er Anfinn Hammerfoss Leo og Paula Einarson ístaðin fyri Bjarna Hammer, eru loknar.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at treytirnar fyri, at Anfinn Hammerfoss Leo tekur sæti í Tvøroyrar býráð fyri Kristin Michelsen, eru loknar. Umframt at treytirnar fyri, at Pauli Einarson tekur sæti sum tiltakslimur fyri Bjarna Hammer eru loknar.

### Skjøl

- Samskifti millum kommunustjóran og virkandi borgarstjóra viðv. innkallan til fund
- Virkandi borgarstjóri innkallar tiltakslim Annfinn H. Leo til býráðsfund

**25.00.00-I00-1-17**

## 2. Samanbering av skattatølum í november og restina av árinum

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin kunnar um skattatølini fyri november og í árinum sum heild.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 13/2017 |
|---|---|
| Fundardagur | 11. december 2017 kl. 17:00-18:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Avgerð**

Býráðið tók kunningina frá borgarstjóranum til eftirtektar.

**Skjøl**

- Samanbering av skatti 2016-2017.xlsx

**00.30.18-G00-1-17**

## 3. Eykajáttan hjá Tvøroyrar kommunu fyri 2017

**Málsfrágreiðing**

1. viðgerð av eykajáttanini hjá Tvøroyrar kommunu fyri 2017.

**Fíggjarnevndin, 11. desember 2017, pkt. 2:**

Fíggjarnevndin samtykti við 1. viðgerð eykajáttanina fyri 2017.

**Avgerð**

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini og góðkendi við 1. viðgerð eykajáttanina fyri 2017.

**Skjøl**

- Endalig eykajáttan 2017



Formansyáttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 13/2017 |
| Fundardagur | 11. december 2017 kl. 17:00-18:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**27.69.40-A00-1-17**

## 4. Velja umboð av Tvøroyri í Eldraráðið fyri Suðuroynna

### Málsfrágreiðing

Eitt eldraráð verður nú stovnað fyri alla Suðuroynna skipað undir Bú- og Heimatænastuni í Suðuroynni. Sosiala nevnd hevur í uppskoti nakrar eldri persónar, sum kunnu hugsast, at vilja umboða Tvøroyrar kommunu í eldraráðnum fyri Suðuroynna.

Súsanna Bertholsen, býráðslimur, hevur spurt 2 av fólkunum, sum eru í uppskoti til at verða vald í Eldraráðið, ávíkavist Alma Fossá og Naia Mols Mortensen, sum báðar hava játtað at umboða Tvøroyri í komandi eldraráðnum.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin, 6. februar 2017, pkt. 2:**
Nevndin mælir til at taka stig til at stovna eldraráð í oynni ella fyri Tvøroyrar Kommunu.
Heit verður á Bjarna Nyggard, trivnaðarfólk, at kanna møguleikarnar við íblástri úr Tórshavn.

**Sosiala nevnd, 1. december 2017, pkt. 9:**
2 persónar skulu veljast í Eldraráðið umboðandi Tvøroyrar kommunu. Sosiala nevnd hevur í uppskoti hesar persónar: Naia Mols Mortensen, Alma Fossá, Jóna Sørensen, Bergur Stórhamar og Kristiannu Strøm. Kristina Roest og Súsanna Bertholdsen fylgir upp við at ringja til nevndu persónar og spyrja, um tey vilja vera umboð í Eldraráðnum.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá sosialu nevnd og velja Alma Fossá og Naia Mols Mortensen í eldraráðið fyri Suðuroynna.

### Skjøl

- Viðtøkur eldraráðið Tórshavnar kommunu
- Samskifti við Kristinu K. Sørensen um eldraráðið
- Svar til borgarstjóran í sambandi við kunning um stovnan av eldraráðið í Suðuroynni
- Tilfar til sosialu nevnd - kunning frá Bú- og Heimatænastuni



O. Vibergsdóttir
Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 13/2017 |
|---|---|
| Fundardagur | 11. december 2017 kl. 17:00-18:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

- Viðtøkur til Eldraráð- Suðuroy.docx

**01.02.05-P24-2-17**

## 5. Broyting av byggisamtyktini á Tvøroyri - partur av matr. nr. 376, matr. nr. 374 og litra "F" verður broytt til øki F "almenn frítíðarøki"

### Málsfrágreiðing

Mælt verður til at broyta byggisamtyktina á Tvøroyri soleiðis at partur av matr. nr. 376, matr. nr. 374 og litra "F" verður broytt til øki F "almenn frítíðarøki".
Ætlanin er at byggja eitt almennt spæliplláss á økinum.

**Tekniska nevnd, 4. december 2017, pkt. 7:**
Nevndin mælir til at broyta byggisamtyktina sambært uppskotinum.
Málið verður lagt fyri býráðið.

### Avgerð

Ein meirluti í býráðnum: Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Anfinn Hammerfoss Leo, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen og Bogi Johannesen samtykti, at broyta byggisamtyktina sambært uppskotinum og tilmæli frá teknisku nevnd.

Pauli Einarson atkvøddi ikki.

Pauli Einarson ynskti at viðmerkja til gerðabókina, at hann setti spurnartekin við, um ferðslutrygdin er í lagi við at staðseta spælipplássi nevnda stað.

### Skjøl

- Broytt_bygsam_376_374_F

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 13/2017 |
| Fundardagur | 11. december 2017 kl. 17:00-18:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**81.07.00-1-17**

## 6. Støðutakan til møguligar samsýningar til starvsnæmingar

### Málsfrágreiðing

Kari Petersen, dagstovnaleiðari, upplýsir, at tað hevur verið siðvenja í dagstovninum, at hava starvsnæmingar úr Tvøroyrar skúla í 14 dagar og geva teimum eina samsýning á eitt gávubræv á kr. 300,- fyri tað. Kari spyr nú, um henda mannagongd skal halda áfram, sí viðfesta skriv frá dagstovnaleiðaranum.

Málið hevur verið viðgjørt í sosialu deild, sum tilmælir, at starvsnæmingar fáa eina samsýning á 500 kr.

**Sosiala nevnd, 1. december 2017, pkt. 11:**
Sosiala nevnd heldur tað er ein skilagóður leistur, at starvsnæmingar av og á er hjá rakstrarstøðum hjá kommununi eisini á dagstovnaøkinum. Sosiala nevnd mælir tí til, at starvsnæmingar fáa eina samsýning á kr. 500,- fyri at vera starvsnæmingur hjá Tvøroyrar kommunu. Málið beint í fíggjarnevndina til endaliga støðutakan.

**Fíggjarnevndin, 11. december 2017, pkt. 5:**
Fíggjarnevndin samtykti, at fylgja tilmælinum frá sosialu nevnd, og veita starvsnæmingum í Tvøroyrar kommunu eina samsýning á kr. 500,- Málið beint til býráðið sum kunning.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá sosialu nevnd og fíggjarnevndini, og veita starvsnæmingum í Tvøroyrar kommunu eina samsýning á kr. 500,-

Býráðið viðmerkti, at mannagongd skal gerast soleiðis at samsýningin til starvsnæmingar er galdandi fyri øll rakstrarstøð hjá Tvøroyrar kommunu.

### Skjøl

- Mál um starvsvenjing hjá fólkaskúlanæmingum.
- Teldubræv frá dagstovnaleiðaranum

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 13/2017 |
| Fundardagur | 11. december 2017 kl. 17:00-18:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

- Skriv og mannagongd í.s.v. starvsvenjing á dagstovninum

**08.00.00-Ø54-1-11**

## 7. Dagføring av reglugerð fyri brúk av bátaplássum

### Málsfrágreiðing

Uppskot er gjørt viðvíkjandi dagføring av reglugerð fyri bátaplássini í Tvøroyrar kommunu, sí viðfesta uppskot.

**Vinnu- og havnanevnd, 8. november 2017, pkt. 1:**
Nevndin hevur gjøgnumgingið uppskotini til dagføring av reglugerð fyri bátapláss, og tekur undir við uppskotinum frá havnarmeistaranum.
Havnameistarin skal gera smávegis tillagingar, sum verða lagdar fyri nevndina á komandi fundi.

**Vinnu- og havnanevnd, 4. december 2017, pkt. 3:**
Nevndin tekur undir við uppskotinum til reglugerð frá havnarmeistaranum, móttikið 23-11-2017.

**Fíggjarnevndin, 11. december 2017, pkt. 8:**
Fíggjarnevndin samtykti, at fylgja tilmælinum frá vinnu- og havnanevndini og góðkenna reglugerðina fyri bátapláss í Tvøroyrar kommunu. Málið beint í býráðið til endaliga góðkenning.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá vinnu- og havnanevndini og fíggjarnevndini, og góðkenna reglugerðina fyri bátapláss í Tvøroyrar kommunu.

### Skjøl

- Uppskot til reglugerð um bátapláss
- Kunning til teknisku deild um at viðgera reglugerð í nevndunum



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 13/2017 |
|---|---|
| Fundardagur | 11. december 2017 kl. 17:00-18:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

- Samskifti við havnarmeistaran um reglugerðina
- Samskifti um reglugerð og oyðublað
- Kunning frá havnarmeistaranum um verandi reglugerð
- Reglugerð 2015.pdf
- Reglugerð uppskot til 2018.docx

**82.03.00-Ø54-1-17**

## 8. Uppskot til leigusáttmála í sambandi við høli til motorlæru í Tvøroyrar skúla

### Málsfrágreiðing

Uppskot til leigusáttmála er gjørdur millum Suðuroyar Sparikassa og Tvøroyrar skúla um leiga av høli á Sjógøtu 79 (gamla bilverkstaðið) til frálæru í motorlæru, sí viðfesta uppskot til leigusáttmála.

**Tekniska nevnd, 4. december 2017, pkt. 2:**
Nevndin tekur leigusáttmálin til eftirtektar.

**Fíggjarnevndin, 11. december 2017, pkt. 9:**
Fíggjarnevndin samtykti, at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevnd, og góðkenna leigusáttmálan, sum verður lagdur fyri býráðið til endaliga góðkenning.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd og fíggjarnevndini, og góðkenna leigusáttmálan millum Tvøroyrar kommunu og Tvøroyrar skúla,

### Skjøl

- Leigusáttmáli við Tvøroyra skúla. 24.11.2017.doc
- Móttøkuváttan frá borgarstjóranum

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 13/2017 |
| Fundardagur | 11. december 2017 kl. 17:00-18:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 13/2017 |
| Fundardagur | 11. december 2017 kl. 17:00-18:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin Fundur lokin kl. 18:00**

Anita Vibergsdóttir

Kristina Roest

Alvi Mortensen

Bogi Johannesen

Súsanna Bertholdsen

Anfinn Hammerfoss Leo

Pauli Einarson

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 13/2017 |
| Fundardagur | 11. december 2017 kl. 17:00-18:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |



11. december 2017

Formansváttan